

## Berlusconi vann

Hóast teir italsku fjølmiðlarnir koma við einari gølusøgu fyri og aðrari eftir um landsins forsætisráðharra, Silvio Berlusconi, eydnaðist tað flokki hansara at vinna valið í gjár til Evropatingið. Hansara miðhøgraflokkur PDL fekk kortini ikki tey 40 prosentini av atkvøðunum, sum Berlusconi hevði væntað, men endaði á 35 prosentum. Miðvinstraflokkurin PD fekk smá 29 prosent, og flokkurin Liga Norður, sum er í samgongu við PDL, fekk 9,6 prosent. Eygleiðarar høvdu væntað, at PDL fór at missa fleiri atkvøður orsakað av gølusøgunum um Berlusconi, men tá saman um kom, var hann ein av teimum fáu stjórnarleiðarunum, sum kundi fegnast um valúrslitið í gjár.

## Kina og Japan hond í hond

Leiðandi politikarar úr Kina og Japan hava avtalað, at tey bæði londini skulu royna at seta ferð á hjólini í heimsbúskapinum, sum hava mist ferðina í seinastuni. Japanski fíggjarmálaráðharrin, Hirofumi Nakasone, segði í gjár, at Kina og Japan eru samd um at fullføra samtyktirnar, sum leiðararnir í G20-londunum gjørdu á fundinum í London í apríl. Londini fara í felag at menna samstarvið við asiatisk lond, sum eru meint rakt av fíggjarkeppuni. Harafturat eru Kina og Japan á einum máli um, at tað er neyðugt at skunda undir samráðingarnar um fríhandil, tí tað fer at seta ferð á heimsbúskapin, siga tey.

# Gramdu seg um órudd

**Á borgarafundinum í Nólsoy seinasta mikukvøld kom fram, at tað var bæði nógv órudd runt um á oynni, samstundis sum vitjandi ikki sleppa av við ruskið**



*Fundarfólkið gramdi seg um, at vitjandi ikki sleppa av við sítt rusk*

*Mynd: Leo Poulsen*

BORGARAFUNDUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eitt av mongu málunum, sum vórðu umrødd á borgarafundinum, sum Tórshavnar kommuna skipaði fyri í Nólsoy seinasta mikukvøld, var órudd og trupulleikin hjá vitjandi at sleppa av við rusk.

Ført varð fram, at tað í alt ov stóran mun flýtur við óruddi, ikki bert í sjálvari bygdini, men eisini í bønum innangarðs.

Trupult er tó at gera nakað við hetta, tí talan er um privata ogn, og slíkt órudd skal verða til beinleiðis ampa ella vanda fyri fólk, skal tað bera til at krevja, at privat fólk beina slíkt burtur av síni egnu ogn.

Eitt annað, sum eisini varð ført fram, var, at tað er sera trupult hjá vitjandi gestum at sleppa av við sítt rusk. Eingin almenn ruskbingja finst. Bert ein á molanum, har týðiliga er tilskipað, at tann bingjan er ætlað vitjandi bátum at lata sítt rusk í.

Ruskplássið í oynni er sjálvandi alment, men er bert opið mikukvøld og leygardagar í nakrar tímar, og vitja avbygdafólk uttan fyri hesar upplatingartíðir, ber ikki til at sleppa av við ruskið.

At hetta er ein trupulleiki sást bert tveir dagar eftir hendan borgarafundin, tá einir fýra til fimm ruskposar vóru settir framvið brimgarðinum á molanum. Hetta var ein skúlaflokkur, sum hevði verið á vitjan í bygdini og hevði búð einar tveir dagar í bygdarhúsinum í Nólsoy. Tey sóu sær ongan annan møguleika enn at seta ruskið frá sær har.

Hetta tykist kortini vera ein trupulleiki, sum rímiliga lættliga kann loysast, og tað lovaði borgarstjórin eisini at hyggja nærri at.

# Til Íslands at býta pengar út

**Grunnurin Tórshavn-Reykjavík-Nuuk hevur fund einaferð um árið, har formansskapurin í teimum trimum býráðunum viðgera umsóknirnar, ið inn eru komnar**

MENTANARGRUNNUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Við flogfarinum í dag til Íslands er formansskapurin í Tórshavnar býráð. Heðin Mortensen, borgarstjóri, Jógvan Arge, 1. varaborgarstjóri, og Jan Christiansen, 2. varaborgarstjóri, fara saman við býráðsskrivaranum til Reykjavíkar á fund í grunninum Tórshavn-Reykjavík-Nuuk.

Talan er um árliga fundin, sum býráðini skiftast um at vera vertir fyri. Í ár er tað Reykjavík, næsta ár Nuuk, áðrenn fundurin aftur verður í Tórshavn.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tað eru komnar sera nógvar umsóknir inn í ár, og tær verða allar viðgjørdar á fundinum í Reykjavík.

Teir tríggir høvuðsstaðirnir lata á hvørjum ári eina ávísa upphædd í grunnin, og saman gera tey trý býráðini so av, hvørjum tiltøkum tey vilja stuðla.

Tað er sjálvandi ein treyt, at tey, sum fáa stuðul, vitja ein av teimum trimum høvuðsstaðunum, og meginreglan er, at umsøkjarar skulu vera frá einum av teimum trimum londunum. Men tað ber tó til at gera undantøk.

- Tað ber til at stuðla umsóknum frá øðrum londum, men tá er treytin, at vitjað verður í minst tveimum av teimum trimum londunum, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at tað eru komnar rættiliga nógvar umsóknir inn í ár, eisini nógvar úr Føroyum. Tað er fyrst og fremst innan mentanina, at stuðla verður.

- Tað kann vera innan tónleik, sjónleik, kórsang, bókmentir og ítrótt. Stutt sagt alt, sum hevur við mentan at gera, sigur Heðin Mortensen.

Hvør høvuðsstaður letur góðar 100.000 krónur í grunnin um árið, og sum er eigur grunnurin umleið 600.000 krónur, so tað ber til at stuðla mongum verkætlanum.

- Allar umsóknir verða viðgjørdar, men tað er sjálvandi ikki vist, at allar fáa stuðul, sigur Heðin Mortensen.

Føroyska ferðalagið fór sum nevnt við flogfarinum í morgun, og kemur aftur fríggjadagin. Meðan teir eru í Íslandi verður hugt at ymsum viðkomandi og fyri formansskapin áhugaverdum støðum.

- Vit læra av teimum, og teir læra av okkum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, er farin til Íslands við restini av formansskapinum í Tórshavnar býráð*